# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Jórunn í Smiðjuni

Fríggjadagin 6. mars kl. 16 letur ein framsýning hjá Jórunn Dánialsdóttir upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Á framsýningini er seymaðar myndir, málningar og onnur listahandverk sum Jórunn fæst við.

Jórun hevur fyrr skipað fyri ymiskum framsýningum sum t.d. í Tilhaldinum og stóru Realskúlaframsýningini í 2007. Hon hevur áður sýnt fram í Smiðjuni saman við øðrum, men hetta er hennara fyrsta sjálvstøðuga framsýning har.

Ferniseringin verður fríggjadagin kl. 16. Framsýningin verður opin til og við týsdagin 10. mars. Opið verður soleiðis: Fríggjadagin frá kl. 16-20, leygardagin frá kl. 10-18, sunnudagin 14-20, mánadagin og týsdagin frá kl. 10-20.



*Framsýningin hjá Jórunn Dánialsdóttir letur upp í Smiðjuni í Lítluvík fríggjadagin kl. 16, tá fernisering verður*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Hárfríðkanarhøllin í nýggjum hølum

Leygardagin var móttøka í nýggju hølunum hjá Hárfríðkanarhøllini í N. Finsensgøtu 30 í Havn.

Eftir at hava hildið til við Hoydalsvegin í 25 ár er Hárfríðkanarhøllin nú flutt til N. Finsensgøtu 30, har sum frisørsalongnin hjá Ásu Perdomu var áður.

Ann Petersen, sum eigur Hárfríðkanarhøllina, sigur, at nýggju hølini er mundandi størri og meira arbeiðsligenn tey við Hoydalsvegin. Eisini eru hølini sett í stand til eina nýmótans frisørsalong.

Tað var Lydia Danielsen, sum setti Hárfríðkanarhøllina á stovn. Fimm frisørar í arbeiða í Hárfríðkanarhøllini, Ann Petersen, Siri Ann Persson, Annika Andreasen, Elida Bjarnadóttir, og Lydia Danielsen.



*Starvsfólkini í Hárfríðkanarhøllini, fremra rað f.v.: Ann Petersen, Lydia Danielsen og Annika Andreasen. Aftanfyri standa Elida Bjarnadóttir og Siri Ann Persson.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Signhild Lundmark**, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Farum, andaðist mánadagin, 72 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Farum kirkju fríggjadagin klokkan 12.

**Kjartan Sivertsen, Norðdepli**, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsið mánadagin, 74 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum hóskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Hermon í Norðdepli fríggjadagin kl.13.30. Tey ið vilja minnast Kjartan kunnu lata eina peningagávu til Barnaheimið Grace Home Ministry í India, konto í Norðoya Sparikassa

P/F Ivan Bilar:

## Endurnýggjað ISO-góðkenningina

TÍÐINDASKRIV

Bilasølan P/F Ivan Bilar við Hoyvíksvegin hevur endurnýggjað ISO-góðkenningina og fingið nýggja heimasíðu.

P/F Ivan Bilar er framvegis einasta ISO góðkenda bilasøla í Føroyum. Hósdagin 11. desembur 2008 var Det Norke Veritas (DNV) á gátt hjá Ivan Bilum, fyri at eftirkanna og gjøgnumganga góðskuskipanina.

Tá starvsfólk saman við umboðnum hjá DNV høvdu gjøgnumgingið skipanina í slakar 8 tímar kundi staðfestast at góðskustøðið hjá einastu ISO góðkendu bilasøluni í landinum er støðugt og enntá hækkandi á fleiri økjum.

### Árliga certifiseringin

Sum partur av DS/EN ISO 9001:2000 góðskuskipanini hjá Ivan Bilum, skal ein gjøgnumgongd av skipanini gerast minst einaferð árliga. Henda var sum áður nevnt hósdagin 11. desembur 2008.

Tað er altíð ein spennandi og ikki sørt gevandi dagur, tá góðskuskipanin verður gjøgnumgingin. Hetta setur krøv bæði til starvsfólk og fyritøkuna sjálva, og kemur í síðsta enda viðskiftafólkunum til góðar. Úrslitið av certifiseringini vísti heilt greitt at Ivan Bilar nýtir góðskuskipanina í gerandisdegnum, og at hetta speglast aftur í teimum mannagongdum sum eru galdandi.

Tað er eingin ivi um, at ISO skipanin hevur týdning bæði fyri leiðslu, starvsfólk og okkara viðskiftafólk. Leiðsla og starvsfólk eru sjálvandi áhugaði í skipaðum viðurskiftum – og viðskiftafólkini eru kundar hjá einari fyritøku sum nýtir góðskustøði sum ein avgerandi “lykil” í kundasamskiftinum. Hetta setur krøv, men við krøvunum fylgja úrslit – og tað ger so heldur einki um kundin hevur tað trygdina at tænasta og góðska eru í hásæti har bilurin verður keyptur.

P/F Ivan Bilar, í hevur 23 fólk í starvi, er framvegis einasta ISO góðkenda bilasølan í landinum.

**80 ára føðingardagur**
7. mars verður Jákup Martin Wang Kvívík 80 ár. Dagurin verður hildin heima.

**75 ára føðingardagur**
Týsdagin 3. mars fylti Andreas Hansen - vanliga nevndur Dia, Kollafjørður 75 ár. Tey, ið vilja heilsa upp á Dia, eru vælkomin til ein bita í Missiónshúsinum í Kollafirði leygardagin 7. mars kl. 11-16.

**70 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 6. mars verður Piddi Hansen av Toftum 70 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Dagurin**
**5. mars. Teophilus**, deyður umleið ár 200. Embætismaður í Kesarea. Navnið merkir hin guðelskandi Niels Juel Arge, útvarpsstjóri, doyði hendan dagin í 1995.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*